52-048/2020

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 48/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Høgni Hoydal, løgtingsmanni um lóggávuvaldið hjá Løgtinginum

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Heldur løgmaður, at danska Fólkatingið kann samtykkja lóggávu á einum málsøki, sum føroyskir myndugleikar hava yvirtikið?

Svar:

Ikki spyrjaranum at siga, so eru viðurskiftini Danmarkar og Føroya millum reglubundin í heimastýrislógini, sum er ein lóg samtykt í tveimum einsljóðandi útgávum. Onnur samtykt av ríkisdegnum og staðfest av kongi og kunngjørd í lovtidende. Hin samtykt av Løgtinginum og staðfest av amtmanninum og kunngjørd í Dimmalætting, sum tá var alment kunngerðarblað í Føroyum.

Heimastýrislógin býtir lóggávuvaldið sundur í millum fólkating og løgting. Løgtingið lóggevur í yvirtiknum málum, fólkatingið í ikki yvirtiknum málum.

Sjálvsagt virða bæði danskir og føroyskir myndugleikar heimastýrislógina. Danir fara ikki at lóggeva á yvirtiknum málsøkjum, og vit fara heldur ikki at lóggeva á ikki yvirtiknum økjum.

Men siga vit kortini, at danir fara at lóggeva á yvirtiknum málsøki, so ber tað ikki lógliga til, uttan at heimastýrislógin verður broytt. Heimastýrislógin kann ikki einsíðugt broytast av fólkatinginum, tí tað er bara onnur almenna útgávan av henni, sum tá verður broytt. Hin einsljóðandi útgávan má eisini broytast, og tað kann einans Løgtingið gera.

Men áhugaverdi spurningurin er ikki, um hvørt danir fara at lóggeva á yvirtiknum málsøkjum, men tulkingarspurningurin av, um tað verður lóggivið á einum yvirtiknum ella ikki yvirtiknum málsøki. Føroyingar kunnu tulka á ein hátt, og danir á ein annan um, hvørt yvirtikið er ella ikki.

Heimastýrislógin er rættuliga greið, tá ið tað snýr seg um tulkingarspurningar av hesum slagi.

Fyrst mugu løgmaður og forsætisráðharrin koma til sættis um, hvussu tulkast skal.

Semjast teir ikki, kann løgmaður ella forsætisráðharrin krevja, at málið verður lagt fyri tann gerðarrætt, sum nevndur er í heimastýrislógini § 6.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Gerðarrætturin er skipaður av tveimum limum valdum av forsætisráðharranum og tveimum limum valdum av løgmanni. Eru teir samdir um eina tulkingarniðurstøðu, er hon endaliga bindandi fyri føroyskar og danskar myndugleikar. Eru teir ikki samdir, koma tríggir hægstarættardómarar í gerðarrættin, og teir gera trætumálið av.

Í Tinganesi, 27. november 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður